# SEMJA

MILLUM

REIÐARAFELAGIÐ FYRI FARMASKIP

OG

FØROYA SKIPARA- OG NAVIGATØRFELAG
MASKINMEISTARAFELAG
FØROYA FISKIMANNAFELAG

Omanfyrinevndu partar eru samdir um at leingja galdandi sáttmálar til 1. mars 2013 við hesum broytingum:

## Høvuðssáttmálarnir

1. Lønin hækkar 1. september 2011 2,5 % og 1. mars 2012 1,13%.

2. Í talvuni í grein 3 stk. 12 í sáttmálanum fyri MMF verða viðbøturnar hækkaðar við 20%. ”*Viðbøturnar í stk. 3 hækka framyvir við sama % stigi sum lønartalvan.*”

3. Grein 5, stk 5 í sáttmálanum fyri MMF verður strikað.

4. Í grein 5 hjá FSN verður verður ásett *“Avspáking vunnin í uppsagnartíðini er partur av uppsagnartíðini”*

5. Í grein 2 hjá MMF verður ásett *“Bert avspáking, vunnin seinastu útmynstring, kann mótroknast uppsagnartíðina. Avspáking vunnin í uppsagnartíðini er partur av uppsagnartíðini.”*

   Í grein 2 stk. 2 hjá MMF verður henda orðing løgd afturat verandi orðing *“Samsýningin í § 41 í lóg um sjómenn kann mótroknast hesi uppsagnartíð”.*

6. Grein 9, stk. 1 í sáttmálanum fyri FSN verður fyrsti partur broyttur til at vera soljóðandi: *“Fyri hvørjar 30 dagar umborð fáa skipari og stýrimaður 30 frídagar.”*

7. Nýtt stk. 9 í sáttmálanum við FSN, í sáttmálanum fyri MMF grein 5, nýtt stk. 12 verður soljóðandi *“Fyri útmynstring longri enn 10 vikur verður latið 1/3 frídag pr. dag fyrstu 14 dagarnar og 2/3 frídag pr. dag fyri eftirfylgjandi dagar”.*

8. Í sáttmálan fyri FSN og í sáttmálan fyri MMF verður henda orðing sett inn sum nýggj grein 13 (fylgjandi greinar broyta nummar samsvarandi):
   *”§ 13. Skipan fyri skipsyvirmenn uttan neyðuga siglingstíð*
   *Skipsyvirmenn uttan neyðuga siglingstíð eru sum meginregla fevndir av høvuðsáttmálanum, tó við teimum ásetingum, sum her eru tilskilaðar.*

*Stk. 1. Útmynstringarskipanin er 2-1, soleiðis at skilja, at fyri hvørjar 30 dagar umborð fáa skipsyvirmenn eftir hesi skipan 15 frídagar. Onnur skipan kann verða nýtt, um partanir eru samdir um hetta.*
*Stk. 2. Reiðaríið verður at leggja frítíðina til rættis soleiðis, at eftir 3 mánaða útmynstring eigur viðkomandi fría ferð og frí eftir stk. 1 við somu føstu mánaðarløn, sum undir útmynstring. Verður skift týttari, verður tað uttan kostnað fyri reiðaríið.*
*Stk 3. Lønin er 26.000 kr. um mánaðin íroknað eftirløn við 2-1 skipan. Um onnur skipan verður avtalað, eigur lønin at vera tillagað samsvarandi hesari.*
*Stk. 4. Skipsyvirmaðurin hevur rætt til at fáa frálæru í øllum viðkomandi skipanum umborð, og áliggur tað reiðarínum at bera so í bandi, at hetta kann lata seg gera.*
*Stk. 5. Setanin og ásetingarnar í hesi grein eru bert galdandi í tíðarskeiðnum til yvirmaðurin hevur siglt sær fyrsta vinnubrævið til, ávikavist STCW III/2 fyri maskinmeistarar og STCW II/2 fyri stýrimenn. Um viðkomandi heldur fram í starvi eftir hetta, er hetta at meta sum nýggj setan, har sáttmálaviðurskiftini og lønin verða sambært vanligu ásetingunum í høvuðssáttmálanum."*

9. Í § 11 stk. 1 fyrsta brot í sáttmálanum fyri FSN verður orðingin "*Fyri skiparar og stýrimenn við upp til 2 ára starvstíð hava hesi skyldu í álmanakkaárinum eftir boðum frá reiðarínum at nýta upp til 7 álmanakkadagar av frídøgunum til skeiðsvirksemi. Eftir 2 ára starvstíð hava skipari og stýrimenn skyldu til eftir boðum frá reiðarínum í almannakkaárinum at nýta upp til 4 álmannakkadagar av frídøgunum til skeiðsvirksemi.*
   *Allir frídagar, sum verða nýttir umframt hesar geva rætt til ein frídag*".
   *Fyri skeiðútreiðslur yvir 25.000 kr., hildnar fyrstu tvey árini, verður afturgjaldsskipan gjørd um fólk sigur seg úr starvi ella verður burturvístur, tó í mesta lagi eina mánaðarløn. Skeiðútreiðslur eru kostnaðurin fyri skeiðini, ferðing og uppihald."*
   *Umframt neyðugar konsekvensbroytingar í restini av greinini.*

10. Í § 12 stk. 1 næsta regla í sáttmálanum fyri MMF verður henda orðing sett inn "*allir frídagar, sum verða nýttir umframt hesar geva rætt til ein frídag*".

11. Í talvuni í grein 13 stk. 1 í sáttmálanum fyri FSN verða viðbøturnar hækkaðar við 10%. "*Viðbøturnar í stk. 3 hækka framyvir við sama % stigi sum lønartalvan."*

12. Grein 13 stk. 2 í sáttmálanum fyri FSN og grein 3 stk. 6 fyri MMF verður strikað.

13. Í grein 14 í sáttmálanum fyri FSN, í grein 4 í sáttmálanum fyri MMF og í grein 2 í sáttmálanum fyri FF verður sett inn sum nýtt stk. 2: "*Eftirlønin verður flutt samstundis sum lønin verður goldin.*"

14. Grein 2, stk. 1 í sáttmálanum fyri FF verður fyrsti setningur orðaður soleiðis: "*Reiðaríið rindar sum eftirløn 8 % av grundhýruni til eina av báðum pørtum góðkenda eftirlønarskipan.*" Næsti setningur verður strikaður.

15. Í sáttmálanum fyri MMF verður §3, stk. 10 strikað. Fylgjandi stykkir broyta nummar samsvarandi.

16. Í sáttmálarnar FSN og MMF verður sett henda grein inn:

*”Feløgini viðurkenna tað samfelagsgagnliga í, at praktikantar kunnu vera partur av manningini, treytað av, at hetta ikki ávirkar fasta manningartalið.”*

17. Partarnir eru samdir um, at í sáttmálaskeiðnum verður settur ein arbeiðsbólkur at skipa lønartalvuna av nýggjum. Hetta arbeiði skal verða klárt at leggja fyri feløgini við samráðingarnar í 2013.

18. FF og Reiðarafelagið fyri Farmaskip eru samd um, at seta ein arbeiðsbólk at hyggja eftir verandi álitisfólkaskipan og evt. orða eina nýggja.

19. Partarnir eru samdir um, at um broytingar verða gjørdar í lóg ella kunngerð sum avleiðing av MLC sáttmálanum, verða tær viðgjørdar til fyrstkomandi samráðingar.

**Sersáttmálarnir fyri størri skip í frálandavinnu**

1. Grein 4 stk. 2 skal orðast soleiðis í báðum førum “*...3 dagar til ferðing samanlagt báðar vegir...*”

2. Grein 5 í øllum sáttmálunum verður strikað. Ístaðin verða viðbøturnar fyri serlig arbeiðir (DP-samsýning, ankerhontering, kjarnuboring, kápulhontering, veitingarskip) partur av viðbótini í §2, stk. 3.

3. Viðbøturnar í grein 1, stk 3 verða ásettar soleiðis:

Fyri Føroya Skipara- og Navigatørfelag:

| Dagfesting | Skipari | Yvirstýrmaður | 1. Stýrmaður |
|---|---|---|---|
| Frá 1. sept. 2011 | kr. 10.560 | kr. 7.150 | kr. 5.445 |

Fyri Maskinmeistarafelagið

| Dagfesting | Maskinstjóri | 1. meistari | 2. meistari |
|---|---|---|---|
| Frá 1. sept. 2011 | 10.032 krónur | 7.150 krónur | 5.445 krónur |

Fyri Føroya Fiskimannafelag

| Dagfesting | Dekkari | Kokkur |
|---|---|---|
| Frá 1. sept. 2011 | 5.170 krónur | 5.170 krónur |

4. Sett verður inn sum nýtt § 2, stk. 4 í allar sáttmálarnar:
*”Viðbøturnar í stk. 3 hækka við sama % stigi sum lønartalvan. Hetta er galdandi so leingi, semjan um verkfall/verkbann er galdandi.”*

5. Í grein 6, stk. 1 í øllum sáttmálunum verður ”1. mars 2006” broytt til 1. mars 2011”.

**Sersáttmálarnir fyri smærri skip í frálandavinnu**

1. *Lønin hækkar við sama % stigi sum lønartalvan.*
2. Grein 3 stk. 1 skal í báðum førum standa"*...4 dagar til ferðing samanlagt báðar vegir...*"
3. Í sáttmálanum við Maskinmeistarafelagið verður alla staðni har tað stendur "*Motorpassarafelagið*" sett "*Maskinmeistarafelagið*".

Galdandi fyri allar broytingar í sáttmálunum er, at tær koma í gildi frá 1. sept. 2011.

**Fyri Føroya Skipara- og Navigatørfelag**

Eyðstein Djurhuus

Regin Nónstein

Ellintur M. Abrahamsen

**Fyri Reiðarafelagið fyri Farmaskip**

Annfinn V. Hansen

Kaj M. Petersen

Rúni V. Poulsen

Jens Meinhard Rasmussen

Gunnbjørn Joensen

**Fyri Maskinmeistarafelagið**

Páll Hansen

John Højsted

Regin Olsen

Jóan Petur Patursson

**Fyri Føroya Fiskimannafelag**

Jan Højgaard